# VARPIÐ





SvF • Týsdag 29. kl. 21.30

**»Vit fara upp á gólv«**
Farið verður á gólv við Tøkum Lætt. Og tað er m.a. Rasmus Joensen, sum skipar. SvF byrjar við at senda frá skrúðgonguni, eisini er gudstænasta og tingsetan á skránni hendan Ólavsøkudagin.



SvF • Fríggjadag 25. kl. 23.15

**»Messias drápini: Hevnarin 1:2«**
Red Metcalfe kriminalinspektørur sær yngra bróðir sín doyggja eftir at vera stungin niður úti á gøtuni. Mordarin sleppur, og starvsfelagarnir hjá Metcalf hava onga slóð at elta. Mitt í sorgini yvir deyða beiggja sín noyðist Metcalfe at jagstra ein ráan raðmordara, sum hevur eini boð til løgregluna. Eini sera blóðug boð. Bretsk stuttrøð frá 2002, og er óhóskandi fyri børn.

Dr1 • Mánadag 28. kl. 19.00

**»Det vilde Kina« - 4:6**
Í fjórða parti av BBC-røðini um Kina verður eystari partur av Kina lýstur, og eisini høvuðsstaðurin Bejing, ein miðstaður fyri eina 5.000 ára gamla siðmenning. Men í hesum fólkaríka landsparti liva eisini heilt sjáldsom djórasløg.

TELEVARPIÐ


Sosialurin

**Fríggjadagur 25. juli 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**